# Arbeiða fyri at fáa felags barnavernd fyri alla Suðuroy

**Tað er nógv, sum bendir á, allar kommunurnar í Suðuroy fara at samstarva um eina felags barnavernd**

BARNAVERND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skulu tað vera ein ella tvær barnaverndir í Suðuroy.

Tað er spurningurin, sum tær sjey kommunurnar í Suðuroy hava viðgjørt tað mesta av árininum.

Kortini má sigast, at tað mest sannlíka er, at tað verður ein felags barnavernd fyri alla Suðuroy.

Á bygdaráðsfundi í Hvalba fríggjakvøldið varð upplýst, at tær flestu kommunurnar í Suðuroy hava tikið undir við at tað verður ein felags barnavernd og nú skulu so allir borgarstjórarnir arbeiða víðari við málinum.

Tað hevur annars tikið sína tíð at koma til hesa niðurstøðu, tí tær sjey kommunurnar í Suðuroy hava viðgjørt málið síðani allarfyrst í árinum.

Serliga Vágs Kommuna hevur verið ivasom, tí í býráðnum har var áhugi fyri at kanna møguleikarnar fyri at hava tvær barnaverndir í Suðuroy, eina fyri syðru helvt og eina fyri norðaru helvt.

Men tað skulu vera minst 1500 fólk í hvørjum barnaverndarøki. Í Vági býr ikki 1500 fólk og tí máttu vágbingar fáa onkra aðra kommunu við sær. Men tað fingu teir ikki, tí allar hinar seks kommunurnar í Suðuroy vilja helst hava eina felags barnavernd fyri alla oynna.



*Flestu kommunurnar í Suðuroy vilja hava eina felags barnavernd fyri alla oynna. Vágs Býráð er eftir at taka støðu, men tað fer býráðið at gera í næstum*

Vágs Kommuna spurdi seg eisini fyri hjá innlendismálaráðið fyri at vita um tað bar til at fáa undantaksloyvi til at stovna egna barnavernd, hóast tað ikki búgva 1500 fólk í Vági.

Men tað vildi innlendismálaráðið ikki og tá ið allar hinar kommunurnar heldur vilja hava eina felags barnavernd, er tað ein spurningur, hvørjar møguleikar vágbingar hava, uttan at vera saman við øllum hinum um eina felags nevnd.

Vágs býráð hevur ikki tikið endaliga støðu til málið, men fer at viðgera tað aftur í næstum.

### Ein limur fyri hvørja kommunu

Tað varð eisini upplýst á bygdaráðsfundi í Hvalba, at ætlanin er, at tað skulu vera sjey limir í nýggju barnaverndini í Suðuroy. Tað verður sostatt ein limur úr Hvørjari kommunu.

Spurningurin um at hava fleiri limir í barnaverndini hevur eisini verið umhugsaður, men hildið varð, at tað fer at gera nevndina óneyðuga dýra og ein størri nevnd fer kanska at verða óliðiligari enn ein lítil nevnd.

Spurningurin verður so hvar umsitingin hjá barnaverndini í Suðuroy skal vera.

Porkenningar hava langt síðani bjóðað sær til at hýsa henni nýggja ráðhúsinum í Porkeri. Men herfyri samtykti Tvøroyrar Býráð at arbeiða fyri at seta eina Sosiala deild á stovn í Suðuroy og tá ið tað var til viðgerðar í býráðnum og býráðslimir duldu ikki fyri, at ein tanki við hesum var at júst skapa møguleikar fyri at hýsa umsitingini hjá eini barnavernd.

# Vilja sleppa úr Føroya Arbeiðarafelag sum skjótast

**Føroya Arbeiðarafelag hevur nú mist sítt størsta limafelag og S&K vil sleppa úr Føroya Arbeiðarafelag sum skjótast**

ÚTMELDING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

S&K hevur nú formliga meldað seg úr Føroya Arbeiðarafelag: Tað hendi á miðdegi í gjár, tá ið nevndin í S&K var inni á Føroya Arbeiðarafelag og handaði forkvinnuni har, Ingeborg Vinther, uppsøgnina.

Tað var herfyri, at ein greiður meiriluti á eykaaðalfundi í S&K, gjørdi av at melda seg úr Føroya Arbeiðarafelag.

Eftir reglunum er S&K sostatt leyst av Føroya Arbeiðarafelag tann 31. desember 2006, ella um eitt gott ár.

Men S&K vil helst sleppa úr Føroya Arbeiðarafelag beinanvegin og tí vil felagið hava Føroya Arbeiðarafelag at taka støðu til um ikki S&K kann verða leyst av Føroya Arbeiðarafelag longu 31. desember í ár.

Eftir lógini kann Føroya Arbeiðarafelag nevniliga eisini koyra eitt felag burturúr og tað er hendan lógargreinin, sum S&K nú vil hava Føroya Arbeiðarafelag at brúka.

S&K sigur, at Hetta er fyri at limirnir í S&K beinanvegin kunnu fáa ágóðan av veitingunum, sum avtala er gjørd við Føroya Lívstrygging um.

### Misti størsta felagið

Tað eru 800 limir í S&K og sostatt hevur Føroya Arbeiðarafelag mist sítt størsta limafelag.

Men formaðurin í S&K, Pætur Niclasen leggur dent á, at talan er ikki um misnøgd við Føroya Arbeiðarafelag.

– Vit meta bara, at vit kunnu fáa frægari sømdir uttanfyri Føroya Arbeiðarafelag. Men tað merkir ikki, at vit ikki kunnu samstarva við Føroya Arbeiðarafelag, t.d. tá ið sáttmálasamráðingar eru.

*Er støðan ikki tann, at tit meldaðu tykkum í Føroya Arbeiðarafelagi fyri at fáa nakrar sømdir, sum tit ikki høvdu fingið einsamøll og nú, tit hava fingið hesar sømdir, so melda tit tykkum bara úr aftur?*

– Nei tað er tað ikki. Vit mugu alla tíðina arbeiða út frá tí veruleika, sum er. Tá ið vit meldaðu okkum í Føroya Arbeiðarafelag í 1997, var tað tí, at felagið tá metti, at tað var tað rætta. Og tað seta vit ikki spurnartekin við. Men støðan broytist alla tíðina og tíðir skifta alla tíðina og nú heldur felagið, at tað er rættast at verða uttanfyri.

– Tað kann væl verða, at støðan um 10 ár er ein heilt onnur, og so verður arbeitt útfrá tí, sigur Pætur Niclasen